


*Maja Popovic, hevari hjá ÍF, roynir at finna frægastu loysnina at fáa bóltin yvirum, meðan spælararnir hjá Mjølni standa klárir hinumegin. Henda dystin var tað tó oddaliðið, ið oftast fann røttu loysnirnar, og ÍF datt úr oddastríðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Mjølnir og Fleyr best fyri

**FLOGBÓLTUR Eftir úrslitini í Eik-liguni hjá kvinnum um vikuskiftið peikar nógv á, at Mjølnir og Fleyr liggja best fyri at koma í FM-finaluna. Spurningurin er, um SÍ kann blanda seg uppí, tí ÍF er nú fokið í oddastríðnum**

Hilmar Jan Hansen

Nú bert fýra umfør eru eftir av kvinnukappingini, hevur Mjølnir eftir øllum at døma sett seg tungt á oddasessin. Tó er bara eittans stigið aftur til Fleyr, ið somuleiðis sær út til at hava fingið luft undir veingirnar. Og so eru heldur ikki meira enn trý stig aftur til SÍ, sum annars var oddalið fyrstu helvtina av kappingini.

Tað verður í øllum førum millum hesi trý, at kappingin um teir báðar finalusessirnar í Eik-liguni hjá kvinnum kemur at standa. Mjølnir hevur víst seg at verið tað stabilasta liðið síðstu tíðina, eins og Fleyr eisini dugir betur og betur at halda høvdið kalt, meðan SÍ hevur svingað eitt sindur meira.

## ÍF úr oddastríðnum

Síðstu tíðina hevur sæð út til, at eisini ÍF skuldi blanda seg upp í oddastríðið, men við tveimum 3-0 ósigrum um vikuskiftið fyri tveimum teimum fremstu liðunum, er ÍF fokið. Í dystinum ímóti Fleyr leygardagin var ÍF væl við alla tíðina, og eitt nú mátti farast út um 25 stig í øðrum setti. Tó vísti tað seg, at Fleyr var tað sterkari og vann øll trý settini.

Í gjár var byrjanin einki serlig, tá Mjølnir tók fyrsta settið við 25-10. ÍF spældi seg upp tey bæði seinnu settini, men fekk kortini einki gjørt við oddaliðið, ið er so mikið væl fyri, at stórt sæð allir spælararnir kunnu avgera bóltarnar. Tað kunnu ikki allir hjá ÍF, og tí liggur ov nógv á fáum spælarum, og tað ger tað eisini lættari hjá einum góðum mótstøðuliði at halda ÍF niðri.

Fleyr, sum bara er eitt stig aftan fyri Mjølnir, spældi í gjár ímóti Drátti, sum hevur ligið aftast allan vetur. Her var heldur eingin slingur í valsinum, og dysturin gjørdist ikki ein av teimum drúgvu. Dráttur kom ongantíð í nánd av at hótta Fleyr, ið sostatt eisini sær út til at styrkna, sum tað líður út á kappingini.

## KÍF er nú niðast

Hinvegin fekk Dráttur leygardagin ein ráran sigur, tá tað á heimavølli eydnaðist at vinna 3-1 á TB, sum meira ella minni hevur verið í fríum falli síðstu dystirnar, nú fleiri av lyklaspælarunum ikki eru tøkir. TB vann fyrsta settið sannførandi, men í trimum teimum síðstu var javnari, har Dráttur hvørja ferð hevði størra yvirskotið til síðst og vann.

Hinvegin reistist TB aftur í gjár, tá KÍF vitjaði Trongisvági. Hetta var eisini ein øgiliga javnur dystur, har tað í trimum teimum fyrstu settunum bara vóru tveir bóltar á muni. TB var aftanfyri í teimum báðum fyrstu settunum, men vann tey kortini, og hóast TB var frammanfyri í triðja setti, endaði tað hjá KÍF, sum tó ikki megnaði at halda stílin í fjórða settinum, ið gav TB sigurin.

## Steypafinalan næst

Sætti kvinnudysturin um vikuskiftið var í Sørvági, har SÍ tók ímóti Ternuni. Hetta var ein dystur, ið gav SÍ møguleika til í friði og náðum at løða battaríini til steypafinaluna leygardagin, sum verður ímóti Mjølni. Sørvágskvinnur spældu væl og vunnu trygt á toftakvinnum, ið ikki megnaðu at hótta nakað serligt.

SÍ vann seg í steypafinaluna sum oddalið eftir fyrsta triðingin, meðan Mjølnir við sigri í bæði Mjølnir- og Fleyr-kappingini vann sær atgongumerki til finaluna, umframt at klaksvíkskvinnur síðani eisini hava yvirtikið oddasessin frá SÍ. Hóast ein steypafinala er ein øðrvísi dystur enn aðrir, kann úrslitið geva eina ábending um, um SÍ kann koma við einum endaspurti, ið hóttir annaðhvørt Mjølnir ella Fleyr, ella um Mjølnir setir eina tjúkka striku undir sína oddastøðu.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### Eik-ligan kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 15 | 2 | 48 | 10 | 38 | 18 |
| 2 | Fleyr | 17 | 14 | 3 | 45 | 17 | 28 | 17 |
| 3 | SÍ | 17 | 13 | 4 | 42 | 21 | 21 | 15 |
| 4 | ÍF | 17 | 9 | 8 | 32 | 29 | 3 | 10 |
| 5 | TB | 17 | 8 | 9 | 30 | 35 | -5 | 9 |
| 6 | Ternan | 17 | 4 | 13 | 17 | 43 | -26 | 5 |
| 7 | Dráttur | 17 | 2 | 15 | 21 | 47 | -26 | 3 |
| 8 | KÍF | 17 | 3 | 14 | 14 | 47 | -33 | 3 |

**Dráttur-TB 3-1** (16-25, 25-22, 26-24, 25-22)
**ÍF-Fleyr 0-3** (20-25, 24-26, 22-25)
**Mjølnir-ÍF 3-0** (25-10, 25-23, 25-22)
**Fleyr-Dráttur 3-0** (25-13, 25-15, 25-10)
**SÍ-Ternan 3-0** (25-16, 26-17, 25-13)
**TB-KÍF 3-1** (25-23, 27-25, 23-25, 25-21)